# Silas Olofson heldur røðu á Grækarismessu



Sunnudagin klokkan 14:45, verður Grækarismessuhald í Klaksvík.

Klaksvíkar Hornorkestur spælir og Silas Olofson flytur fram røðu.

Haldið, ið verður fyriskipað av hornorkestrinum, fer fram í hølunum hjá KFUM.




*Hóast kava og kulda, so fyrireika føroyingar seg tl at taka ímóti tjøldrunum, sum koma í morgin...*

# Kári Árting heldur røðu í Havn

## GRÆKARISMESSA Skótalið Sigmunds Brestisson skipar fyri grækarismessuhaldi í Havn sunnudagin

Grækarismessuhaldið í Havn verður sunnudagin klokkan 15.00. Tað er Skótalið Sigmunds Brestissonar, sum skipar fyri.

Grækarismessudagur 12. mars, har skótarnir saman við borgarum í býnum, heilsa várinum og og flytifuglunum vælkomnumtil landið. Frá gamlari tíð er sagt, at Tjaldri, tjóðfuglur okkara kemur á grækarismessu.

Tað var Sverri patursson, sum fyrstur helt fólkafund á hesum degi í seinru helvt á 1930 árunum; loysunar orð hansara var: Latið smáfugl og heiðafugl hava frið!. Tað var Sverri Patursson sum heitti á skótarnar um at halda henda



dagin í 1942, tí hann meinti at skótarnir livdi eitt við náttúruna.

Nú halda vit grækarismessu við skótaskrúðgongu og fólkafundum fleiri staðni í Føroyum og heilsa Tjaldrinum, vælkomið til land okkara aftur.

Allir skótar, úlvar, og títtlingar í Havn og á Argjum, fara at ganga skrúgongu og Havnar Hornorkestur spælir. Øll skulu møta í sínum skótahølum klokkan 14. Klokkan 14.45 fer skrúðgongan úr Vágsbotni. Gingið verður eftir Bøgøtu, síðani eftir Tróndargøtu, Niels Finsensgøtu oman á Vaglið. Sjálvt Grækarismessuhaldið verður á Vaglinum í Havn klokkan 15.

Í ár verður tað Kári Árting sum hevur verðið Fylkisstjóri í SSB og nú stjóri í Rit & Rák, fer at halda grækarismessurøðuna í ár.



# Tríggjar ferðir Godot

**Tjóðpallur Føroya**
*Tíðindaskriv*

Í samband við leikin "Meðan vit bíða eftir Godot" fer Tjóðpallur Føroya at skipa fyri nøkrum seinnaparts tiltøkum. Byrjað verður komandi sunnudag 13.03.11 kl. 15.00, har Eyðun Johannessen, leikstjóri fer at hugleiða um sína ferð við "Godot og Beckett". Hann hevur nevniliga sett hendan leik upp í Sjónleikarhúsinum í 1962, síðani á Århus Teater í 1981 og nú í 2011 á Tjóðpallinum.

Hava uppsetingarnar broytt seg við tíðini? Er leikurin hin sami nú sum tá? Hevur leikstjórin broytt seg? Er hann hin sami nú sum tá? Sæst hetta 50 ára "samlívið" aftur í MEÐAN VIT BÍÐA EFTIR GODOT á Tjóðpallin í 2011.

Sunnudagin 20. mars kl. 15.00 fer Mikkjal N. Helmsdal, leiklistafrøðingur at hava eina framløgu undir heitinum " Beckett og Godot í leiklistarsøguligum høpi"

Meðan vit bíða eftir Godot myndar eitt vegamót í leiklistini, og peikar bæði aftureftir og frameftir í leiklistarsøguna. Aftureftir, tí Beckett var sera ein sera tilvitaður og væl lisin rithøvundur, ið kendi sína bókmenta- og leiklistasøgu út og inn, og frameftir, tí Beckett og hinir absurdi leikhøvundarnir í samtíð hansara gjørdist ímyndin av nýbroti og nýhugsan innan sjónleikaskriving og fingu stóra ávirkan á eftirfylgjandi ættarliðini. Í fyrilestrinum verður stutt lýst, hvat Absurda leiklistin sum rák var, og Beckett verðu lýstur sum rithøvundur við serligum atliti til arbeiði hansara at skriva leikin Meðan vit bíða eftir Godot. Víst verður á, at hóast Beckett ger upp við meginrákini í evropeiskari leiklist, so byggir hann samstundis í stóran mun víðari á nógvar av kendastu høvundunum innan hevdvunnu leiklistina.

Sjónleikurin "Meðan vit bíða eftir Godot" verður spældur kl. 18.00 báðar hesar dagarnar.

